Álit

í

løgtingsmáli nr. 98/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin) (Samsýning til fosturforeldur)

Bárður á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, hevur lagt málið fram 28. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð tann 7. mai 2026 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12. og 21. mai 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Fosturforeldrafelagið, Barnaverndarstovu Føroya og landsstýrismannin í mentamálum.

Barnaverndarlógin hevur meira enn 20 ár á baki. Lógin heimilar kommununum at seta á stovn eina fosturforeldraskipan fyri alt landið, sum er partur av virkseminum á Barnaverndarstovuni.

Tá børn verða sett til fosturs hjá fosturforeldrum, verða hesi sett til at hava umsorganina fyri barninum, antin varandi, bráðfeingis, fyribils ella til umlættingar í heiminum hjá fosturforeldrum.

Avtala verður gjørd millum fosturforeldur og Fosturforeldraskipanina, sum eisini ásetur samsýningina til fosturforeldrini sambært galdandi reglum.

Umframt samsýning verður eisini latið fast gjald til m.a. vistarhald og klæði.

Í fleiri ár (2015-2025) hevur gjaldið til m.a. vistarhald og klæði ikki verið javnað regluliga og hevur tí ikki fylgt kostnaðarstøðinum. Hetta merkir, at fosturforeldur í dag fáa áleið 1.300 kr. minni um mánaðin fyri hvørt barn, enn tey høvdu fingið við regluligari javning.

Gjaldið fyri vistarhald og klæði er ætlað at tryggja fosturforeldrum rímiligt endurgjald fyri tær útreiðslur, ið standast av at hava barn til fosturs.

Kommunurnar, ið eru tær, sum rinda gjaldið, mæla til at hækka gjaldið til vistarhald og klæði til børn, sum eru hjá fosturfamiljum, soleiðis at tað verður ájavnt við tað, sum gjaldið hevði verið, um tað varð javnað við 3% árliga í árunum 2015-2015.

Talan er bert um hesa einu veitingina, sum verður hækkað við hesari broyting.

Undir viðgerðini av málinum hava fleiri partar víst á tørvin at endurskoða fosturforeldraskipanina og barnaverndarlógina í síni heild. Nevndin hevur fingið upplýst, at arbeitt verður við hesum máli, og at ætlanin er at fara undir eina tilgongd at eftirmeta fosturforeldraskipanina, har m.a. ein lýsing av einari samsýningarskipan, sum stuðlar undir endamálinum við fosturforeldraskipanini, skal gerast.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 23. mai 2026

Grímur Sundstein formaður	Sámal Petur í Grund næstformaður	Liljan Weihe
Sunnvá Dahl Høgfeldt	Magni Højgaard	Bjørt Lind
	Bjørg Brynhildardóttir Egholm	